Skjal (8)

Heilsurøktarafelagið

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn

Tórshavn 17.09.2018

**Hoyringssvar frá Heilsurøktarafelagnum um uppskot til Løgtingslóg um almannatrygd og vælferð við fleiri**

Heilsurøktarafelagið er eitt av fleiri áhugafeløgunumm, ið hevur fingið løgtingslógaruppskotið um almannatrygd og vælferð til hoyringar. Vit hava lisið uppskotini og almennu viðmerkingarnar, og greiða niðanfyri frá okkara hugsanum um uppskotini við hesum viðmerkingum.

Vit taka fult undir við *Uppskoti til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kærunevnd í almanna-, familju. og heilsumálum.*

Í mun til *Uppskot til Løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (Vælferðarlógina)* er at siga, at vísandi til § 47 Stk. 3, má tryggjast, at nærri reglur um serlig tilboð og stuðul til sjálvbodnar felagsskapir, sum skipa serlig bútilboð, mugu fylgja almenna standardinum til nøktandi tænastu við væl skikkaðum starvsfólki, sum hava góðkenda útbúgving innan heilsu- og umsorgan.
Tá ið uppskotið gjøgnumgangandi leggur dent á at javnstilla fólk, ið tørva tænastur av slíkum slag, er alneyðugt, at tað eisini innihaldssliga er eitt høgt góðskustig við fakligum kapitali á øllum tænastum, ið verða bodnar út.

At starvast innan læstar dyr og vindeygu, eru meira enn vanliga tyngjandi arbeiðsumstøður hjá heilsurøktarum og øðrum starvsfólkum á sosial- og námsfrøðiøkinum. Hóast tað er eitt annað lógarøki, sum viðvíkur arbeiðsumhvørvi, so mugu altíð havast í huga atlit til trygd og heilsu hjá starvsfólkum, soleiðis at tilrættisleggjan og skipan av arbeiðinum til eina og hvørja tíð er fult forsvarlig.
Eisini kundi verið lagt upp fyri hesum eyka vandanum, starvsfólk eru í, við eini ávísari mánaðarligari viðbót, eins og vit kenna tað frá stongdari psykiatriskari deild, men hetta er neyvan

Heilsurøktarafelagið J. Paturssonar gøtu 24, 100 Tórshavn, Faroe Islands
Tlf. 315670
heilsurokt@gmail.com    www.heilsuroktarafelagid.fo

nakað, ið beinleiðis eigur at vera skrivað í lóg.

Vísandi til § 64 um ráðgevandi ráð í smb við brekpolitiskar spurningar, er, so vítt vit hava bitið merki í, ikki nágreinað, hvør eigur at vera limur í slíkum ráð. Vit mæla í tí sambandi sjálvsagt til, at tað er ein blanding av fakfólki - íroknað heilsurøktarar - og leikfólki við góðum innliti í brekviðurskifti, eitt nú fólk, ið sjálvi bera brek ella avvarandi.

Í mun til avtalur um veiting av tænastum, sum Almannaverkið eftir hesi lóg skal kunna gera um tænastu frá øðrum almennum og privatum veitara, vísandi til kap. 5 og 6 í lógini, má aftur her, tryggjast, at hesar sosialar tænastur og vardu bústaðir upp á allar mátar liva upp til tann høga fakliga standard sum er, og framhaldandi eigur at vera í tænastunum undir Almannaverkinum og líknandi tilboðum, við kompetentum fakfólkum á odda fyri at kunna veita eina dygdargóða tænastu til borgaran.
Eisini viðvíkjandi § 36 um borgarastýrda stuðulstænastu er alneyðugt, at tann persónur, ið fær stuðulstænastuna er væl og virðiliga kunnaður um, hvørjir fakligir førleikar finnast í tí stóra tilfeingi av heilsurøktarum, námsfrøðingum, ergoterapeutum o.s.fr., so til at veita besta stuðulin í hvørjum einstøkum føri, áðrenn viðkomandi skal taka avgerð um, hvør skal virka sum stuðulsfólk, hvat stuðulstænastan skal nýtast til og nær.

At enda skulu vit undirstrika, at sosialnámsfrøðilig viðgerð undir Almannaverkinum liggur innanfyri kompetansuøkið hjá heilsurøktarum (bls. 13  §49 Stk. 2).

*Uppskot til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (tvingsilslógin)* er sera týðandi partur av hesum lógaruppskoti, og her sýnist eisini veruliga at hava lagt upp fyri, at neyðug inntriv kunnu setast í verk á so mildan hátt, sum tilber, og at rættartrygdin hjá borgaranum er í hásæti. Men vandi kann vera fyri starvsfólk í mun til skráseting og fráboðan, §22. Tí er neyðugt, at starvsfólkapolitikkurin á økinum verjir starvsfólk fyri møguligum ágangi ella sanktiónum frá leiðsluni bæði í mun til nógvar og í mun til fáar skrásetingar og fráboðanir, sum í ringasta føri kunnu verða lastaðar einstaka starvsfólkinum. Tí er umráðandi at hava eitt trygt og álitisfult samband millum allar liður í fyriskipanini til gagns fyri borgarar og starvsfólk.

Heilsurøktarafelagið J. Paturssonar gøtu 24, 100 Tórshavn, Faroe Islands
Tlf. 315670
heilsurokt@gmail.com    www.heilsuroktarafelagid.fo

Heilsurøktarafelagið

Tvingsilsnevndin, § 4 í uppskotinum eigur, eftir okkara tykki, ikki at vera avmarkað til bert at vera umboðað av námsfrøðingi og sjúkrarøktarfrøðingi, umframt lækna og løgfrøðingi, men eigur heldur at vera umboðað av skiftandi fakfólki, so sum tveimum nevndarlimum, ið umboða eitt nú heilsurøktarar, sosialráðgevar, námsfrøðingar ella sjúkrarøktarfrøðingar t.d. Hetta fyri at upprætthalda eini fakligari breidd í nevndini, tá talan er um tvørfakligt arbeiði við nógvum ymiskum og neyðugum kompetansum.

Vit hava onga viðmerking til *Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd*, sum vit meta er innanfyri alla neyðuga verju av børnum og ungum.

*Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. (markamót)* umrøður tann partin av arbeiðsmarknaðinum hjá heilsurøktarum, har vit eru eina mest umboðað sum fakbólkur og sita inni við størstu fakligu førleikunum at veita eldri borgarum stuðul, tænastu og røkt. Vit vísa til § 1, 1. í uppskotinum, har mælt verður til at taka orðið "stuðul" burtur úr § 9 Stk. 3. Hesum taka vit ikki fult undir við, tá røkt og stuðul illa kunnu skiljast at í dagliga arbeiðinum við eldri, førleikaskerdum borgarum. Tað kann tarna heildarrøktini, sum er ein neyðugur táttur í at veita eina samanhangandi umsorganartænastu í tí dagliga. Um mett verður, at orðingin í § 10: "...sjúku ið er progressiv og degenererandi, **tænastur,** ið kunnu stimbra viðkomandi likamliga, sálarliga og sosialt..." kompenserar fyri at taka burtur orðið "stuðul", so eru vit kortini trygg við tað. Í almennu viðmerkingunum til hetta verður ført fram (á bls. 6), at stuðul og røkt krevja ymiskan fakligan førleika, men her mugu vit kraftiga undirstrika, at heilsurøktarayrkið inniheldur bæði stuðul og røkt. Tað er m.a. tað, sum er tann stóri fyrimunurin við, at hava heilsurøktarar í starvi í Almannaverkinum, at vit eru fult kompetent til at røkja bæði stuðuls- og røktaruppgávur, tí flestu borgarar, ið fáa tænastur av frá Almannaverkinum tørva bæði stuðul og røkt.
§ 12 Stk. 1, sum umrøður, at kommunur kunnu taka avgerð um at veita fólki samsýning, ið átaka sær at ansa heima, persóni við ellisbreki og/ella varandi sjúku, eru vit sera ivasom um. Fyri okkum at síggja, vera her eingi krøv sett til fakkunnleika, og tað kunnu vit als ikki góðtaka at hava í lóg. Vit síggja sum er, alt ov nógv til, at vantandi fakkunnleiki er á sambýlum o.ø., við tað at nógv ófaklærd eru í starvi í røktar- og umsorganartænastunum kring landið, og tað ger tað trupult hjá tí einstaka heilsurøktaranum og øðrum umsorganar-, virknis- og røktarfakbólkum at tryggja dygdargóða

tænastu til borgaran, tá tænastutoymið er so fakliga veikt. Ein lágur standardur má ikki lógartryggjast á hendan hátt. Tí mæla vit til, at tit broyta orðið ”fólki” í lógaruppskotinum til ”almanna- og heilsufakfólki”, og orðið ”samsýning” til ”løn”.

Sum heild fegnast vit um uppskotið. Tað var neyðugt at orða tær avbjóðingarnar, sum markamótsnevndin higartil hevur tikið sær av at loysa, og fáa øll viðurskifti klárløgd og ábyrgd tillutaða, so eingin ivi longur er um, hvør stovnur tekur sær av hvørjum og borgaranum er tryggjað ein samanhangandi tænasta, eisini tá viðurskifti, so sum aldur, broytast.

Rakul í Gerðinum, forkvinna

Heilsurøktarafelagið J. Paturssonar gøtu 24, 100 Tórshavn, Faroe Islands
Tlf. 315670
heilsurokt@gmail.com www.heilsuroktarafelagid.fo